# 13 ordanir givnir

**Sum vant, tá ið drotningin kemur á vitjan, gav hon eisini hesuferð heiðurstekin. 12 mans og ein kvinna vórðu heiðrað á hesum sinni**

HOFF-STOFF
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður*

Edmund Joensen, løgtingsformaður fekk kommandørheiðurstekin av Dannebrogordaninum.

Bjarni Djurholm, Annfinn Kallsberg, Alex Sólstein, Jørn Astrup Hansen, Pál Weihe, Karolina Petersen, Bergur Poulsen, Dánjal Petur Højgaard, Olaf á Stongunum og Eyðun Andreasen fingu øll riddarakrossin av dannebrogordaninum frá drotningini.

Suni Hansen og Henry Debes Joensen fingu báðir tænastuheiðursmerki í silvuri, fyri teirra drúgvu tænastu sum organistar, ávikavist í Nósloyar og Argja kirkju.



## Karolina Petersen

Karolina Petersen var ógvuliga fegin um at fáa viðurkenning frá drotningini.

Drotningin segði, at hon var fegin um at kunna handa mær heiðurstekini, fyri tað arbeiðið, sum eg havi gjørt, og tað var deiligt at hoyra tað frá henni.

Karolina hevur verið 45 ár á Alv skúlanum. Hon hevur eisini stovnað tvey vistarheim og verið við at stovna Hotel Tórshavn. Karolina harmaðist tó um, at drotningin og hon vóru tveyeinig konufólk umborð. – Tað eru nógv konufólk í Føroyum, sum kundu fingið heiðurstekin, heldur hon.



## Pál Weihe, lækni og granskari

– Vit tosaðu um leyst og fast um gransking. Eg fekk ikki at vita júst hvat tað var, sum gjørdi, at eg fekk krossin, men tað er sjálvandi ein æra, at verða heiðraður. Gott, at vita, at tað verður prísur settur á tað arbeiðið, sum vit gera, segði Pál Weihe, júst sum hann var komin í land aftur.



## Edmund Joensen

Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevur fyrr verið heiðraður. Hann fór umborð á Dannebrog við einum krossi á bringuni, men kom í land aftur við einum krossi um hálsin.

# Fingu ráð frá Edmundi Joensen



*Bergur Poulsen og Dánjal Petur Højgaard fingu báðir riddarakrossin frá drotningini*

– Áðrenn vit fóru umborð fingu vit góð ráð frá Edmundi Joensen, sum jú hevur roynt hetta fyrr, um hvat vit skuldu siga og gera, sigur Dánjal Petur Højgaard,

– Tað var stak hugnaligt umborð. Vit komu inn til drotningini ein og ein, og blivu presentraði so hvørt sum vit komu inn. Drotningin stóð mitt á gólvinum, tók í hondina á okkum, og segði, at tað var henni ein gleði at handa okkum heiðurstekini. Síðani hongdi hon hann á, greiðir Bergur Poulsen frá.

– Eftir, at øll høvdu fingið krossin, savnaðust vit úti í eitt slag av einum forsali, har drotningini eisini kom. Har drukku vit so eitt glas saman, og so varð prátað um leyst og fast. Hetta er heilt víst ein æra, og tað kennist væl, at onkur setur prís uppá arbeiðið, sum man ger, siga teir báðir bergur og Dánjal Petur at enda.




# LÆRUPLÁSS
## í Timburhandlinum á Kambsdali

Vit sóknast eftir einum lærlingi til Timburdeild okkara á Kambsdali at byrja skjótast møguligt.

Vit vilja bjóða tær eina útbúgving í eini framkomnari fyritøku, ið virkar í einum spennandi og skjóttvaksandi virkisøki innan handil við byggitilfari.

Útbúgvingin fevnir um breiða og grundleggjandi vitan innan sølu- og innkeypi av byggitilfari.

Tú skalt saman við starvsfelagum tínum vera við í tí støðugu menningini av handli okkara, har vit seta tænastu og góðsku í hásæti.

Vit krevja, at tú:
- í minsta lagi hevur lokið FHS-prógv
- ert útatvend/ur
- ert nærlagd/ur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og kanst liva upp til omanfyri nevndu krøv, kanst tú senda okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum.

Umsóknin skal sendast til:

**Timburhandilin**
Heykavegur 4
Box 3038
FO-110 Tórshavn

***Freistin at søkja er 1. juli 2005***

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Hilbert Joensen, deildarleiðara, á tlf. 44 44 41.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN
TÓRSHAVN • KAMBSDALUR